Dimmalætting

Stovnað 1878

Ábyrgdarblaðstjóri: Beate L. Jensen
Blaðstjóri: Georg L. Petersen
Útgevari: P/F Dimmalætting

Tað mátti koma

Páskaboðskapurin frá Javnaðarflokkinum var ikki at fara skeivur av. Løgmaður er ódugnaligur, enntá skríggjandi, stóð at lesa á forsíðuni í floksblaðnum. Tað var ein fyrrverandi sambandstingmaður sum var upprunin til orðini. Inni í blaðnum varð so roynt at styrkja henda boðskap, við at tosa við eina annan sambandsmann. Hesin segði at samgongan helst ikki fór at halda árið út.

Við at leggja greinirnar saman kundi ikki annað fáast burturúr, at ein ódugnaligur sambandsløgmaður hevur skuldina av, um val verður skrivað út í ótíð. Fyri at seta punktum, er samrøða í sama blaði við landsstýrismannin við figgjarmálum. Hann kemur har við nøkrum skilagóðum orðum, sum hann hevði ætlað sær at sagt við nýggja formannin í Fíggingargrunninum. Men hann fekk ikki fyri løgmanni. Við øðrum orðum vil løgmaður ikki lurta eftir fornufti heldur. Hann er ódugnaligur enn einaferð.

Tað er sjáldan at ein er vitni til eina so gjøgnumførda roynd at manipulera lesaran/veljaran. Fløksblað javnaðarmanna og harvið flokkurin hevur lagt upp til val, eingin ivi um tað. Ein væl blandaður cocktail av journalistikki sett saman propagandu er eftir øllum at døma uppskriftin hjá javnaðarmonnum at skora tá val verður - og sum skilst á javnaðarmonnum, verður hetta helst skjótt.

Tað skal bara ikki síggja út sum um at tað eru teir sjálvir, sum skunda undir valið. Óhumskan skal kastast á onkran annan, so Javnaðarflokkurin skal standa við eini gloriu um høvdið, tá valstríðið byrjar.

Javnaðarglorian er ikki ókend, hvørki her ella í grannalondum okkara. Boðskapurin er, at hesin flokkur altíð er fornuftigur og hugsar um mannin á gøtuni - hóast tað neyvan er hann á gøtuni, sum er grundarlagið undir leiðslu floksins. Har sita nakrir útspekuleraðir leiðarar, sum við síni góðu bakgrund kunnu slúa platt upp á eina fyri langt síðani farna tíð, tá sosialt órættvísi var nakað flokkurin veruliga kundi berjast fyri. Tá var innihaldið meira ektað, og tann sum gekk við reyða flagginum 1. mei hevði nakað at stríðast fyri. Hann fann sær eitt sosialdemokratiskt tilhald. Tað mundi tó vera skjótt, at akademikarar og onnur sóu sær ein møguleika at vinna sær politiskt vald. Teirra egna stætt kundi jú ikki bera nøkrum flokki. Sum tíðin er liðin, hevur henda stætt tekna arbeiðararørsluna. Tað hevur tó altíð verið umráðandi at dult baktankan. Og í hesum snildum eru javnaðarmenn sannir meistarar. Akademikarin við søguligu arbeiðaragloriuni hevur vunnið sær fótafesti við eini manipulatión, sum neyvan áður hevur sæð sín líka. Eins og í grannalondum okkara hevur føroyski javnaðarflokkurin brúkt fjølmiðlar sum sítt besta vápn. Hesir fjølmiðlar hava seinastu árini mist sítt fótafesti í grannalondunum, og hevur tað havt við sær, at javnaðarflokkarnir hava mist nakað av sínum trygga fótafesti.

Tað er at vóna, at fólk fáa eyguni upp fyri hesum, nú føroyski javnaðarflokkurin royndir at kasta óhumskuna á Sambandsflokkin. Tað ræður um at vara seg fyri aggressivum álopstaktikki og ikki lata seg ríva við, men heldur seta seg afturá og hugsa seg um. Tað kundi verið, at komið varð til ta niðurstøðu, at Javnaðarflokkurin spælir sær ábyrgdarleyst við sínum politiska valdi.

Andlát og tøkkir

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara góði maður, papi, verpápi, abbi og langabbi

John Kjærbæk
fyrrverandi yvirtollari

andaðist 6. apríl, 82 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Nørre Søby kirkju á Fyn hósdagin 11. apríl kl. 13.

Fyri tey avvarðandi
Helena, Dorrit, Asa og Törkil

†

Hervið verður gjørt kunnugt,
at okkara kæra mamma og systir

Signhild Konradsson
Reykjavik
ættað av Borg á Argjum

andaðist skirisdag, 88 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Garðakirkju í Garðabæ friggjadagin 12. apríl.

Familjunnar vegna
Malla, Mia og Anna
á Borg

Tøkk

Vit takka øllum hjartaliga, sum syndu samkensluhug, tá kæri papi, abbi, langabbi, verpápi og bróðir okkara

Karl Jacobsen

doyði og varð jarðaður. Takk til øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Fyri tey avvarðandi
Guttorm, Maiken, Kim, Mogens og Unn við familju

Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum teimum mongu, sum gleddu meg á 75 ára degnum 10. mars við gávum, telegrammum, telefonsamrøðum og blomum. Hjartaliga takk øll.

Heilsan
Daniel Jacob Jensen

Viðmerkingar

Aftur til tey politisku málini

Í sambandi við formansvalið boðaði nýggi formaður Javnaðarfloks frá, at hann nú skuldi gera Javnaðarflokkin sjónligari í samgonguni. Nýggi formaðurin hevur sent nakrar ballonir upp í Sosialinum, sum hinir fjølmiðlarnir hava roynt at blást meira luft í. Eftir mínum tykki er innihaldið eisini tann bera luft.

Sum so ofta fyrr tvørraði bæði Sosialinum og Javnaðarflokkinum grundgevingar. Í staðin fyri at viðgera tey aktuellu politisku málini, løgdu teir eftir persónum.

Til hetta havi eg bert eina stutta viðmerking. Hatta avdúkaði blaðið og persónin, og hetta er okkum ikki ókent frá fyrr. Fari at heita á Sosialin og flokk hansara um heldur at halda seg til tey politisku málini, ti tað eru tey, ið telja, tá ið valskeiðið er av. Tey málini, sum vorðu viðgjørd undan páskum, voru serliga hesi:

Normalisering av bankanum

Hetta er ikki nakað nýtt mál. Í samráðingunum við danir hava vit lagt upp til hesa loysnina. Fráfarni formaðurin í Fíggingargrunninum frá 1992 tók undir við hesi sjálvsøgdu loysn. Nýggi formaðurin Knud Heinesen tekur somuleiðis undir við henni, og leiðslan í bankanum tekur eisini undir við hesum.

Sjálvt framstandandi vinnulívsmenn í Fólkaflokkinum, spurdir av Sosialinum, taka fult og heilt undir við privatiseringini. Men sum altið hjá Fólkaflokkinum, so er tíðin ikki komin til at reka rættan politikk.

Bankin hevur fyri neyðini at fáa jørðfestið í føroyska fólkinum aftur. Ein normalisering hevði komið fólkinum til góðar. Serliga um tey avskrivaðu sethúsalánini vórðu løgd í Húsalánsgrunninum, sum so kundi tikið sær av tí sosiala partinum. Harumfrámt taki eg sjálvur undir við, at gomlu partaeigararnir fáa endurgjald fyri missin.

Veruleikin er tann, at tað er ikki eg, sum knappliga krevji normalisering av bankanum. Tað er harafturímóti avtalað í seinastu felagslýsingini millum donsku ríkisstjórnina og landsstýrið. At so avisir javnaðarmenn ikki vilja viðurkenna hesa loysn, sum arbeitt hevur verið fyri í longri tíð, er nakað annað.

Avtalaðu sparingarnar upp á 32 mió. kr.

Hetta varð avtalað í samband við tann samtykta skattalættan, og hetta var ein fyrirtreyt fyri at geva skattalættan. Ti ber tað ikki til hjá Javnaðarflokkinum at leypa fra hesi avtalu. Stutt sagt: Sambandsflokkin ella annan samgongufluk sjónligari.

Fyri at allir landsstýrismenn skuldu hava høvi til at hitta Richard Mikkelsen og Knud Heinesen, bjóðaði løgmaður landsstýrismonnunum til dagurða saman við nevndini. At ein flokkur ikki var umboðaður, er ein onnur søga, sum eg ikki kenni til fulnar. Við dagurðan hevði ligið væl fyri hjá nýklakta formanni Javnaðarfloksins at skift orð við Knud Heinesen. Annars kann eg leggja aftrat, at Knud Heinesen var her í fleiri dagar, og eg tvist ikki í, at hann fegin hevði komið á fund við nýggja formannin í Javnaðarflokkinum, varð hann spurdur.

Hvussu leingi heldur samgongan?

Sosialurin hevði eina samrøðu við ein av tingmonnum Sambandsfloksins. Bjørn á Heygum var sakligur, hann var ivasamur um samgonguna og verður endurgivin fyri at hava sagt: »Áhaldandi skuldsetingarnar og ábreiðslurnar imillum Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin eru so uppslitandi, at samgongan heldur ikki árið út.«

Persónliga eri eg ikki serliga eymur, ta talan er um skuldsetingar og ábreiðslur. Eg verði neyvan við til at slíta eina samgongu vegna persónligar skuldsetingar frá Sosialinum ella øðrum. Harafturímóti gevi eg einki lýfti um, ikki sjálvkravdur at slíta eina samgongu, um greiðar avtalur um ætlaða politikkin, herundir ein normalisering av bankakervinum og tær avtalaðu sparingarnar, ikki verða hildnar av okkara samgonguflukkum.

Edmund Joensen
løgmaður

Skemtisøgan um fund við Knud Heinesen og Richard Mikkelsen

Nývaldi formaður Javnaðarfloksins er avbera firtin um, at eg hevði ein fund við fráfarandi og komandi formannin fyri Fíggingargrunnin frá 1992. Hann segði seg hava ein hop at bera fram fyri Knud Heinesen, og tað hevði hann ætlað á ti stuttu kurteisisfundinum, sum formenninir høvdu ynskt við løgmann, sum umsitur málsøkið.

Slík praktisk mál sum hølisviðurskifti m.a. framyvir hýa grunninum, sum høvdu verið umrødd áðrenn, vórðu umrødd nú við nýggja formannin. Fundurin var avgjørt ikki ætlaður at gera hvørki Javnaðarflokkin, Sambandsflokkin ella annan samgongufluk sjónligari.

Fyri at allir landsstýrismenn skuldu hava høvi til arbeitt við hesum evni og hevur nýtt ymsa tøkni, eitt nú: áseyming, vatnlitir, veving, steinprent, serigrafi og bronsustoyping.

Væl av fólki var mætt tá ið framsýningin læt upp. Hon er partvís ein søluframsýning og verður opin til 1. mai, hvønn dag kl. 10-18.

Astrid Andreassen

Astrid Andreassen á Danmarks Akvarium

Pálmasunnudag læt upp listaframsýning á Danmarks Akvarium í Charlottenlund, har eisini Astrid Andreassen úr Havn er boðin við.

Flestu myndirnar eru av fiskum og øðrum úr havinum kring Føroyar. Astrid Andreassen hevur í fleiri ár

Tillukku við barninum

Hvønn leygardag ynskir Dimmalætting foreldrum tillukku við lítla barninum, annaðhvørt bara í teksti ella í teksti og myndum. Hetta gera foreldrini sjálvt av. Send bræv/bjálvan til Dimmalætting, postboks 19, 110 Tórshavn merkt »Tillukku við barninum«, skriva avsendara, navn og adressu, so vit kunnu senda myndina aftur sum skjótast. Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd í blaðið. Vit skulu hava myndirnar í seinasta lagi friggjamorgun. Um foreldrini ynskja tað, kann myndafólk frá bíaðnum taka myndina ókeypis. Ring 11212, og vit avtala nærri.

6.B í Eysturskúlanum og 6.B í Ándalsnes:

Brævaskifti um sild og olju

Í summar kemur ein norskur flokkur at vitja 6.B-flokk í Eysturskúlanum í Havn. Aftaná fer 6.B við norska flokkinum til Noregs.

Flokkarnir eru pennavinir. Norski flokkurin eitur eisini 6.B og er úr Ándalsnes, ið er lítil býur millum Álesund og Molde.

Flokkarnir hava skrivað saman í try ár. Onkuntíð hava føroysku næmingarnir sent norsku vinum sínum føroysku bløðini. Tað hevur verið tá bløðini hava umrøtt norsk viðurskifti, eitt nú tvídráttin um norðhavssildina.

Norski flokkurin og lærari teirra halda lítið um sildaklandrið. Siga, at vit eru grannar og at grannar klandrast ikki.

Í Føroyum verða stórar vónir settar til oljuvinnuna í framtíðini. Í Noregi hava tey leingi havt oljuvinnu. Frá norska flokkinum í Ándalsnes hava næmingarnir í Eysturskúlanum fingið eina stuttliga søgu, ið er skrivað sum eitt ævintýr. Søgan hevur staðið í Ándalsnes Posten og snýr seg um oljuvinnu.

Kanska er henda søgan ikki bara eitt ævintýr. »Snipp, snapp, snútu« eitur hon.

ÁNDALSNES AVIS 25

Raumo kommune 30 år

Det var en gang en ordfører som fikk besøk av noen store mell. Trollene sa at de gjerne ville leke et sykke land av ordføreren. «Vi skal bygge noen store maskiner til å bore hull i havbunnen med!», sa trollene.

Ordføreren og noen andre samfunnsledere hans ble svært glade, for nå trodde de at alle skulle bli rike på gods og gull i en fart. Så trollene fikk leke lander.

Snart satte de i gang med gravemaskiner, lastebiler, betonekraner, blandemaskiner. Det ble et frykteleg leven, og mange folk fikk lov til å arbeide for trollene. Den første boremaskina sto ferdig en dag og ble i full fart stoppet av på det store havet. Så begynte de på enda en boremaskin. Hammene sang, gnistregnet sto til alle kanter, motorene brølte – og til slutt kunne også den andre maskina lauets bort.

Så ble det plutselig stille. «Skal ikke trollene bygge flere boremaskiner?», begynte folk å spekulere. Tiden gikk, men nesten ingen ting skjedde. Så tikk folk beskjed om at de skulle gjøre klar noen lange rør, som skulle plasseres mellom boremaskinene ute på havet og fjernkontrollene inne på land.

Men etter dette ble det atter stille. Og verken folket eller ordføreren visste hva de nå skulle foreta seg. De store trollene var spesielt borte, og siden da har ingen sett noe til dem, verken i øst eller vest. Og snipp, snapp, snute – så var visst hele eventyret allerede ute.

Snipp, snapp, snute –

SÅ VAR OLJEEVENTYRET UTE

Kanska ikki bara eitt ævintýr, heldur ein veruleiki um oljuvinnuna